# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum: www.sosialurin.fo

# KÍ er endiliga í finaluni

*Fótbóltssvangir føroyingar hava allar møguleikar at metta svongdina 2. juli. Tá er nevnliga møguleiki at hyggja eftir ikki færri enn trimum finaludystum*

JÁKUP MØRK

Í triðju royndini eydnaðist tað hjá KÍ og B36 at gera av, hvør teirra slapp at spæla móti HB í finaludystinum í steypakappingini hjá kvinnunum.

**Rótutur dystir**

Eftir at KÍ hevði vunnið fyrru hálvfinaluna í Havn 4-3, eydnaðist tað teimum týskvøldið at finna 1-0 á heimavølli, soleiðis at tær samanlagt vunnu hálvfinaluna 5-3.

Sum skilst úr Klaksvik, var talan ikki um nakran væl spældan dyst týskvøldið. Bæði liðini vóru týðuliga tyngd av týdninginum, sum dysturin hevði, og hetta viðførdi, at talan ofta gjørdist um tilvildarligt sparkarí, heldur enn nakað skipað fótbóltsspæl.



*Malena Josephsen avgjørdi dystin móti B36*
**Mynd: JH**

Malena Josphsen avgjørdi dystin, tá hon eitt korter inn í seinna hálvleik slapp leys av B36 verjuni, og akkúrát megnaði at fáa bóltin inn um strikuna, áðrenn ein verjuleikari sparkaði burtur.

B36 hevði fram til tá havt gott tak á KÍ liðnum, men eftir málið, mistu tær líkasum mótið, og samlaði sigurin kom ikki í vanda eftir hetta.

**Á graslíki**

Finaludysturin hjá kvinnunum verður, eins og tann hjá monnunum, spældur sunnudagin 2. juli, men í mun til dystin um løgmanssteypið, spæla kvinnurnar á graslíki.

Tað hevur annars ljóðað, at eisini tann dysturin skuldi verða leiktur á Tórsvølli, men hetta verður so av ongum í hesum umfari.

Dysturin hjá kvinnunum er ásettur at byrja klokkan 12.30, meðan menninir spæla klokkan 15.00.

**Fótbóltur í 5tímar**

Tað hevur verið ført fram, at tað er sera óheppið, at finalan um løgmassteypið verður leikt sama dag, sum EM finalan verður at síggja beinleiðis í sjónvarpinum, tí hetta kann vera við til at minka um áskoðarafjøldina.

Dystirnir verða tó ikki leiktir samstundis, tí EM finalan byrjar ikki fyrr enn klokkan 19.00, so til teirra, sum ikki kunnu fáa nóg mikið av fótbólti, ber til at síggja út við fimm tímar av fótbólti. Ja, kanska 6 tímar, um talan í øllum trimum førum verður um longda leiktíð.

# Enn ein sigur til Gunnar

*Súkkling : Annað umfar av Grand-prix kappingini í súkkling, gjørdist sera taktiskt, og einki varð avgjørt fyrr enn á sjálvari málstrikuni*

Í tí rímuliga góða veðrinum á eystanstevnu, vóru eitt sindur av fólki komin saman niðri á havnaøkinum at hyggja eftir súkklukappingini, sum Tórshavnar súkklufelag skipar fyri.

Kappingin er býtt í súkkling fyri menn, kvinnur, unglingar og súkkling fyri óvitar.

Býðarkoyringin er skipað soleiðis, at alt feltið súkklar 3 róligar umgangir har allir súkklarnir eru samlaðir og síðan byrjar súkklinging av álvara. Tá 50 min eru farnir, verður ringt fyri seinast umgangi.

Rættuliga stórur spenningur var áðrenn kappingina, tí ein av okkara góðu gomlu súkklarum, sum vit eisini kenna frá Oyggjaleikunum, skuldi vera við í kappingini á eystanstevnu. Tað er Jóhann Brend, sum í løtuni býr niðri og venur við CC.Gladsaxe.

**Fór í tveir bólkar**

Klokkan eitt sindur yvir seks byrjaði súkklukappingin og tað gekk væl at fáa súkklarnar avstað. Fyrstu umførini koyrdu allir súkklararnir róligt, har hvør súkklari legði seg so væl fyri í feltinum sum gjørligt. Teir fyrstu 10 min varð ferðin rættuliga høg, og súkklararnir arbeiddu væl saman, men stutt eftir tað varð kom split í og súkklararnir fóru í tveir bólkar.

Í høvusfeltinum vóru nú Gunnar, Jóhann og Kári og arbeiddu teir sera væl saman. Í tí seinra feltinum vóru Eyðun, Esmar og Kristian, teir arbeiddu eisini væl saman, sjálvt um tað til tíðir kundi tykjast heldur rótut um hvør skuldi taka leiðsluna.

**Javnnur endaspurtur**

Í seinnu helvt av kappingini vísti Kári Brattaberg rættuliga væl, hvussu góður taktikari hann er. Hann spardi kreftirnar hjá sær til endaspurtin. Tað kundi kanska tykjast løgið, hví Johann og Gunnar ikki forðaðu honum í hesum, men hvussu var og ikki, so fingu teir ongantíð slitið seg leysar av Kára. Ferðin var annars rættuliga høg, og fremri bólkurin var ein heilan umgangt framman fyri seinna bólkin, tá endaspurturin for í gongd.

Tá klokkan ringdi eftir teir 50 minuttirnar, fór ferðin enn meira upp. Teir tríggir í oddinum, Gunnar, Johann og Kári, royndu at lúra hvønn annan av, og eingin vildi vera vera fyrstur avstað. Eftir seinasta svingið, royndi Kári at skræða seg leysan, og tað var eisini líkt til, at hann skuldi halda leiðsluna seinasta teinin inn á mál. Tað eydnaðist tó Gunnari at fáa hjólið framum Kára, soleiðis at Gunnar vann spurtin. Kári megnaði tó akkurát at halda seg framman fyri Johann, sum sostatt gjørdist nr. 3.

**Ùrslit, 2.umfar av Grand Prix Føroyar**

**Menn :**
1 Gunnar Dahl Olsen (80 stig)
2 Kári Brattaberg (68 stig)
3 Sverri Edvinson (56)
4 Esmar Joensen (49)
5 Eyðun Poulsen (45)
6 Kristian Guttesen( 36)
7 Evald Rasmussen (36)
8 Jóhann Brend (30)
9 Geyr Gilsteinsson (68)

**Kvinnur :**
1 Ann Zachariassen (80)

**Unglingar :**
1 Eli Christiansen (74)
2 Ísak Sambleben (40)

**Súkklu kapping fyri børn 5-9**
**Dreingir :**
1 Rani G. Jacobsen
2 Róaldur Jacobsen
3 Andreas Danielsen

**Gentur :**
1 Julia Danielsen

**Súkklu kapping fyri børn 10-15**
**Dreingir :**
1 Beinir Jacobsen
2 Dánjal Michalsen
3 Helgi Poulsen

**Gentur**
1 Randi G. Jacobsen

# Skráin fyri endaspælið

*Skráin fyri endaspælið hjá kvinnum er nú fastløgd*

JÁKUP MØRK

Eftir at skipanin hjá kvinnunum varð broytt í ár, vórðu tey 11 liðini, sum høvdu boðað frá luttøku, fyrst býtt í tveir bólkar.

Eftir at hava spælt heima- og útidyst móti hvørjum øðrum, skulu trý tey fremstu liðini í hvørjum bólki spæla endaumfarið í fyrstu deild, meðan hini liðini skulu spæla í aðru deild í heyst.

Skránnar fyri tær báðar deildinar eru nú lagdar, og verða tær prentaðar niðanfyri.

**Eingin finala**

Skal metast eftir teimum úrslitum, sum hava verið í bólkaspælinum í vár, er lítið at ivast í, at KÍ og HB, sum hava vunnið allar dystirnar higartil, eiga tey bæði sterkastu kvinnuliðini í landinum. B36 og VB tykjast tó ikki vera so øguliga langt aftanfyri.

Tí kann tað tykjast heldur løgið, at teir báðir bólkavinnarnir hittast longu í fyrsta umfarinum í endaspælinum. Verður gongdin hin sama í heyst, hevur FSF við hesum tikið møguleikan fyri eini rættari finalu burtur, tí FM-heitið kann í roynd og veru longu verða avgjørt, ta seinni dysturin millum KÍ og HB verður leiktur í Havn 27. august.

At síggja til, hevði mest upplagda loysnin verið, at liðini bæði hittust í seinasta umfarinnum, og at VB og B36 eisini spldi móti hvørjum øðrum sama leikdag.

**1. deild**

24.06 B36-GÍ/Skála
24.06 VB-NSÍ
24.06 KÍ-HB

30.07 B36-VB
30.07 NSÍ-KÍ
30.07 GÍ/Skála-HB

06.08 KÍ-B36
06.08 HB-NSÍ
06.08 VB-GÍ/Skála

13.08 VB-KÍ
13.08 B36-HB
13.08 GÍ/Skála-NSÍ

20.08 NSÍ-B36
20.08 HB-VB
20.08 KÍ-GÍ/Skála

27.08 GÍ/Skála-B36
27.08 NSÍ-VB
27.08 HB-KÍ

02.09 VB-B36
02.09 KÍ-NSÍ
02.09 HB-GÍ/Skála

10.09 B36-KÍ
10.09 NSÍ-HB
10.09 GÍ/Skála-VB

17.09 KÍ-VB
17.09 HB-B36
17.09 NSÍ-GÍ-Skála

24.09 B36-NSÍ
24.09 VB-HB
24.09 GÍ/Skála-KÍ

**2. deild**

24.06 AB-EB/Streymur
24.06 Sumba-B71

30.07 GÍ/Skála-AB
30.07 EB/Streymur-Sumba

06.08 Sumba-GÍ/Skála
06.08 B71-EB/Streymur

13.08 AB-Sumba
13.08 GÍ/Skála-B71

20.08 EB/Streymur-GÍ/Skála
20.08 B71-AB

27.08 EB/Streymur-AB
27.08 B71-Sumba

02.09 AB-GÍ/Skála
02.09 Sumba-EB/Streymur

10.09 GÍ/Skála-Sumba
10.09 EB/Streymur-B71

17.09 Sumba-AB
17.09 B71-GÍ/Skála

24.09 GÍ/Skála-EB/Streymur
24.09 AB-B71



# EURO 2000 endaspælið

## Bólkur A

**Ongland-Rumenia 2-3 (1-2)**
1-0: Chivu 20.
1-1: Owen 41.
2-1: Shearer (br.) 45.
2-2: Monteanu 48.
2-3: Ganea 89.

**Portugal-Týskland 3-0 (1-0)**
1-0: Conecicao 35.
2-0: Conecicao 54.
3-0: Conecicao 71.

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Portugal | 3 | 0 | 0 | 7-2 | 9 |
| 2 Rumenia | 1 | 1 | 1 | 4-4 | 4 |
| 3 Ongland | 1 | 0 | 2 | 5-6 | 3 |
| 4 Týskland | 0 | 1 | 2 | 1-5 | 1 |

## Bólkur B

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Italia | 3 | 0 | 0 | 6-2 | 9 |
| 2 Turkaland | 1 | 1 | 1 | 3-2 | 4 |
| 3 Belgia | 1 | 0 | 2 | 2-5 | 3 |
| 4 Svøríki | 0 | 1 | 2 | 2-4 | 1 |

## Bólkur C

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Jugoslavia | 1 | 1 | 0 | 4-3 | 4 |
| 2 Noreg | 1 | 0 | 1 | 1-1 | 3 |
| 3 Spania | 1 | 0 | 1 | 2-2 | 3 |
| 4 Slovenia | 0 | 1 | 1 | 4-5 | 1 |

**Komandi dystir:**

21.06 Jugoslavia-Spania
21.06 Slovenia-Noreg

## Bólkur D

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Frakland | 2 | 0 | 0 | 5-1 | 6 |
| 2 Holland | 2 | 0 | 0 | 4-0 | 6 |
| 3 Kekkia | 0 | 0 | 2 | 1-3 | 0 |
| 4 Danmark | 0 | 0 | 2 | 0-2 | 0 |

**Komandi dystir:**

21.06 Danmark-Kekkia
21.06 Frakland-Holland

# EM-stubbar

**Verða nógv betri**

Hollendski landsliðsleikarin, Marc Overmars, er sannførdur um, at hollendska liðið er ført fyri at spæla nógv betri fótbólt, enn higartil víst.

- Vit hava vunnið tveir dystir, og eru longu í fjórðingsfinaluni, men vit hava valla sparkað til ein ´bólt enn, segði Marc Overmas millum annað. Hann tykist annars sannførdur um, at fær Holland spælið at koyra á rættan hátt, er einki at ivast í, at teir kunnu koma heilt langt í kappiningi.

**Broytt odds**

Lagið á ensku veddingarfyritøkunum er sum veðrið í Føroyum. Sambært seinasta listanum eru fransmenn framvegis favorittar, men nú eru oddsini farin niður til 2,25.

Á næstu plássunum eru Holland og Italia, meðan Portugal nú er á fjórða plássi.

**Friðarligt i Charleroi**

Fólk óttaðust kanska, at ensku áskoðararnir skuldu fara at gera um seg, tá ta var greitt, at EM-endaspælið var liðugt fyri teirra viðkomandi.

Um tað er orsakað av gula kortinum frá UEFA, ella um vónbrotið bara var ov stórt, er ilt at siga, men í øllum førum var sera friðarligt í Charleroi týskvøldið.

Meginparturin av ensku viðhaldsfólkunum fór beina leið á flogvøllin, og tey, sum vóru eftir, gjørdu ikki nogv hóvasták burturúr.

**Schmeichel gevst ikki**

Danski landsliðsmálverjin, Peter Schmeichel, hevur ongar ætlanir um at gevast við at spæla fótbólt á hægsta støið.



*Ein hugsunarsamur Ribbeck, í seinasta dysti sínum sum týskur landsliðsvenjari*

Stóri málverjin, sum longu hevur spælt 124 landsdystir, sigur seg sum so ikki hava nakað mál í.s.v. dystarmet ella nakað, men ætlar sær at vera við, so leingi hann er nóg góður, og so leingi sum honum dámar at vera við á landsliðnum.

**Royndirnar avgerandi**

Franski verjuspælarin, Frank Leboeuf, roknar við, at tað verður okkurt av vanliga stóru fótbóltslondunum, sum at enda fer avstað við EM-heitinum.

Leboeuf roknar sjálvur við, at Frakland eisini telist millum londini, sum hava góðan møguleika at vinna EM-heitið. – Vit hava allar tær dygdir, sum gjørdu okkum til heimsmeistarar fyri tveimum árum síðani, og harumframt eru vit royndari nú, og megna tískil betri at stýra dystunum, sigur verjuspælarin millum annað.

**Ribbech givin**

Týski landsliðsvenjarin, Erich Ribbeck, hevur tikið avleiðingarnar av vánaligu týsku úrslitunum, og hevur sagt starvið sum venjari frá sær.

Ribbeck segði seg longu undan endaspælinum ivast í, hvussu framtíð hansara fór at veraa, tí atfinningarnar móti honum hava verið sera nógvar. Atfinningarnar eru ikki vorðnar færri, meðan endaspælið er farið fram, og m.a. hevur tað verið stór misnøgd um, at venjarin alla tíðina hevur hildið fast um avgeråina at nýta Lothar Matthäus á liðnum.

Enn er ikki greitt, hvør eftirmaðurin hjá Ribbeck verður, men í fjølmiðlunum verður gitt, at Giovanni Trappatoni er favorittur til heita sessin, eftir at bæði Franz Beckenbauer og Ottmar Hitzfeldt hava sagt, at teir ikki eru áhugaðir í starvinum.

Trappatoni er mest vinnandi italski venjarin yvirhøvur, og umframt at hava vant hópin av italskum stórfeløgum, hevur hann eisini kunnleika til týskan fótbólt, har hann í tveimum umførum hevur verið venjari hjá Bayern München, har hann báðu ferðirnar varð uppsagdur eftir einum ári.

# Lítil stórveldi

*Bæði Ongland og Týskland vórðu týskvøldið send heim úr EM-endaspælinum*

JÁKUP MØRK

Tað er ikki á hvørjum ári, at týskarar soleiðis uttan víðari verða sendir heim úr nakrari fótbóltskapping í úrtíð.

Meira konkret, kann sigast, at hetta er fyrsta ferðin síðani 1984, at týska landsliðið ikki er komið víðari úr innleiðandi bólkaspælinum í einum endaspæli.

**Í aldudali**

Tað ferðina varð tað ikki fyrr enn í seinastu minuttunum, av seinasta dystinum í bólkaspælinum, at Týskland mátti lúta fyri Spania.

Hesu ferð er nakað øðtvísi, tí Týskland hevur als ikki prógvað, at teir í løtuni teljast millum bestu liðini í Europa, og tað gera teir helst heldur ikki.

Úrslitið hevur við sær, at týski venjarin hevur sagt seg úr starvið. Atfinningarnar móti honum hava alla tíðina verið nógvar, serliga tí hann hevur nýtt so nógvar gamlar leikarar. Spurningurin hevur tá alla tíðina verið, um hann hevur havt aðrar møguleikar.

Týskur fótbóltur er nevnliga í einum djúpumk aldudali í løtuni. Gaman í standa fleiri av týsku feløgunum seg væl í europeiskum høpi, men í flestu førum er hetta orsakað av teimum útlendsku leikarum, sum liðini hava knýtt at sær. Eitt gott barometur fyri støðið er eisini, at tað í dag eru nógv færri týskir leikarar, sum royna seg hjá stóru feløgunum í Spania og Italia.

Líkt er tí til, at líkamikið hvør verður settur sum nýggjur týskur venjari, fær eina uppgávu, sum nærum er ógjørlig. Áskoðararnir vilja síggja úrslit, men við leikaratilfarinum, sum Týskland hevur í løtuni, er vandi fyri, at vónirnar nú eiga at skrúvast nakað væl niðureftir.



*Lothar Matthäus tóktist alt annað enn fegin eftir sín 150. landsdyst fyri Týskland*

**Við í 88 minuttir**

Ongland skuldi bert hava javnleik í dystinum móti Rumenia, fyri at tryggja sær sess í fjórðingsfinaluni.

Eftir eina vánaliga byrjan, har Rumenia beinavegin kom á odda, eydnaðist tað tó onglendingum at koma á odda beint fyri hálvleik.

Rumenia svaraði tó skjótt aftur, og meginpartin av seinna hálvleiki var líkt til, at javnleikur skuldi gerast úrslitið.

Gary Neville man neyvan minnast hendan dystin við gleði, tí stutt fyri leiklok, var hann atvoldin til, at rumenar fingu brotsspark, sum eisini skuldi vísa seg at vera avgerandi fyri dystin.

**Farvæl til Shearer**

Tapið hevði við sær, at enski liðskiparin, Alan Shearer, nú hevur leikt sín seinasta landsdyst.

Undan endaspælinum boðaði hann frá, at hann gavst á landsliðnum eftir EM, og hetta stendur hann fast við.

Hinvegin hevði rumenski sigurin við sær, at ein av heimsins bestu leikarum seinastu árini, Gheorge Hagi, nú hevur møguleikan at siga farvæl á ein virðiligan hátt.

Orsakað av tveimum gulum kortum var hann nevnliga leikbannaður til dystin móti Onglandi, men nú fær hann so enn ein møguleika móti Italia, sum higartil hev-